## Angola og Algeria víðari

Bæði vertirnir úr Angola og HM-klára Algeria eru komin víðari til fjórðingsfinalurnar í African Nations Cup, eftir at liðini spældu ein málleysan javnleik sínamillum. Malawi, sum í setanardystinum skelkaði øll við at vinna 3-0 á Algeria, tapti 1-3 fyri Mali, og tí eru bæði liðini útsligin hesa ferð, hóast tey hvørt í sínum lagi hava gjørt vart við seg í kappingini.



## Andras Gango gevst í ÍF

Andras Gango, sum hevur vart málið hjá ÍF síðstu árini, verður ikki at síggja í málinum hjá ÍF hetta kappingarárið. Formaðurin í ÍF, Ólavur Larsen, váttar fyri Dimmalætting, at Gango ikki ynskir at umboða ÍF framyvir. Sostatt er ÍF næsta felag í Eysturoynni, sum má biðja málverja sínum farvæl, tí síðsta vikuskifti kom fram, at Meinhardt Joensen skiftir frá NSÍ til B36.

## Stórt norðurlendskt íkast í EM

**Í dag klokkan 17 byrjar EM-endaspælið í manshondbólti. Danmark, Ísland, Noreg og Svøríki eru øll við í endaspælinum hesaferð**




Heri Simonsen

EM-endaspælið verður á hesum sinni í einari minni hondbóltstjóð. Eysturríki er meira kent fyri síni avrik á skíðbreytunum og á vetrar-OL, enn fyri síni avrik á hondbóltsvøllinum. Men alpubúgvarnir eru eitt systematiskt fólk, sum dugir væl at reika fyri, og tí er lítil ivi um, at samskipanarliga er EM-endaspælið í góðum eysturríkskum hondum.

16 lond fara at taka lut í EM-endaspælinum, og tey eru deild í fýra innleiðandi bólkar við fýra londum í hvørjum bólki. Trý tey bestu í hvørjum bólki vinna seg víðari til millumumfarið, har tey taka innanhýsis stigini við sær tí millumumfarið.

Í millumumfarinum verða liðini úr bólki A og B parað, og liðini í bólki C og D verða parað. Sum sæst á leikskránni, sum er prentað her í blaðnum, so er talan um góðar klokkutíðir í sjónvarpinum, sum ikki fara at órógva náttarsvøvnin. Til ber at hyggja eftir EM-dystum á danska TV2 og á TV2 Viasat Sport. Miðlarnir hjá Miðlahúsinum, Sosialurin, Portalurin og Rás2 fara somuleiðis allir at fylgja kappingini.



Íslendski landsliðsmálverjin, Björgvin Páll Gústavsson, skal royna at verja málið ímóti millum annað donsku skjúttunum, sum eru í innleiðandi bólki saman við íslendingum
Mynd: AFP/Scanpix

# Danmark og Ísland byrja í sama bólki

**Nógvur norðurlendskur spenningur verður óivað á skránni í bólki B, har Danmark og Ísland skulu kappast sínamillum, umframt við Eysturríki og Serbia**




Heri Simonsen

Bólkur B er uttan iva tann bólkurin, sum føroyskir hondbóltsfjepparar eru mest spentir uppá. Danmark og Ísland eru enn einaferð í bólki saman – hesa ferð saman við Eysturríki og Serbia.

Á pappírinum eru Danmark og Ísland sterkari enn Eysturríki, sum er kent fyri sítt harða verjuspæl. Men Eysturríki hevur heimavøll, og tað gevur teimum ein eyka fyrimun.

Hondbóltsserfrøðingarnir hjá danska TV2, Bent Nyegaard og Nikolaj Jakobsen, meta Serbia at verða eitt rættiliga óútrokniligt lið, sum á einum góðum degi kann koppa øllum liðum, men sum skjótt fellur saman í mótgongd.

Íslendska liðið, sum vann søguligt OL-silvur í Beijing í 2008, vann seg ikki í HM-endaspælið í 2009, og tað vilja íslendingar gjarna hevna á vøllinum. Supermaðurin, Òlafur Stefánsson er vorðin 36 ára gamal, men hevur enn risastóran týdning fyri liðið. Men á liðnum eru aðrir sterkir altjóða profilar, so sum Logi Geirsson, Snorri Steinn Guðjónsson, Robert Gunnarsson og Guðjón Valur Sigurðsson.

Danmark er komið til Eysturríkis at verja sítt EM-heitið, og hevur EM verið ein eydnusom kapping hjá dønum í hesari øldini. Bæði í 2002, 2004 og í 2006 vann Danmark bronsu, og í 2008 gjørdist tað so loksins gull. Liðið fekk tó ein lítlan niðurtúr til OL-endaspælið í Beijing, tá liðið endaði á einum sjeynda plássi. Danmark endaði, sum nummar fýra við HM-endaspælið í 2009. Bent Nyegaard trýr, at Danmark kann fara allan vegin og vinna eina EM-finalu ímóti Fraklandi. Hondbóltsserfrøðingurin hjá Miðlahúsinum, Svein Rógvi Nielsen trýr heldur, at tað verður ein finala millum Danmark og Frakland, sum Frakland fer at vinna. Liðið hevur nógvar framúr altjóða spælarar, so sum Kasper Hvidt, Lars Christiansen, Mikkel Hansen, Michael V. Knudsen og Lars Jørgensen. Stórir forvæntningar til danska liðið, og ikki uttan grund.

Leygarkvøldið klokkan 19.15 verður dysturin millum Danmark og Ísland vístur á TV2. Ein dystur, sum mangur her á landi fer at hyggja eftir.

### Innleiðandi EM-skráin

| | | |
|---|---|---|
| **Bólkur A** | | |
| 19/01 | Russland-Ukraina | 17.10 |
| 19/01 | Kroatia-Noreg | 19.10 |
| 21/01 | Ukraina-Kroatia | 17.10 |
| 21/01 | Noreg-Russland | 19.10 |
| 23/01 | Kroatia-Russland | 17.10 |
| 23/01 | Noreg-Ukraina | 19.10 |
| **Bólkur B** | | |
| 19/01 | Danmark-Eysturríki | 17.00 |
| 19/01 | Ísland-Serbia | 19.15 |
| 21/01 | Eysturríki-Ísland | 17.00 |
| 21/01 | Serbia-Danmark | 19.15 |
| 23/01 | Eysturríki-Serbia | 17.00 |
| 23/01 | Danmark-Ísland | 19.15 |
| **Bólkur C** | | |
| 19/01 | Týskland-Pólland | 17.30 |
| 19/01 | Svøríki-Slovenia | 19.30 |
| 20/01 | Slovenia-Týskland | 17.30 |
| 20/01 | Pólland-Svøríki | 19.30 |
| 22/01 | Týskland-Svøríki | 17.15 |
| 22/01 | Pólland-Slovenia | 19.15 |
| **Bólkur D** | | |
| 19/01 | Spania-Kekkia | 17.15 |
| 19/01 | Frakland-Ungarn | 19.15 |
| 20/01 | Kekkia-Frakland | 17.15 |
| 20/01 | Ungarn-Spania | 19.15 |
| 22/01 | Frakland-Spania | 17.15 |
| 22/01 | Ungarn-Kekkia | 19.15 |